# SUM EIN FERIA

**BÚSETING** – Tað er fantastiskt at búgva her, serliga um summarið, tá náttúran kring bygdina veruliga kemur til sín rætt, sigur 34 ára gamla Borghild á Fløghamri úr Havn, men sum nú býr í Oyndarfirði. - Hjá okkum er heldur ikki neyðugt at fara aðrastaðni at ferðast. Tað er sum ein feria at búgva her.



Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Tað er ikki altíð, at hagtølini siga allan sannleikan. Serliga ikki, tá talan er um hvagar fólk flyta.

Meðan nógv velja at flyta til høvuðsstaðin, finnast fólk í Havn sum ganga ímóti hesum streymi. Eitt dømi um hetta eru hjúnini og havnarfólkini, Martin og Borghild á Fløghamri sum síðani 2002 hava búð í Oyndarfirði.

– Nógv hava undrað seg um tað, og hava sagt, at tey als ikki orka so mikið sum at hugsa tankan um at skula búgva nakra aðrastaðni enn í Havn.

– Men tey flestu halda tó, at tað er fríkst at vit búgva her. Avgerandi var tó fyri okkum tá, at vit altíð høvdu møguleika at koyra til Havnar og ikki verða bundin at øðrum. Og vit trívast sera væl her, sigur Borghild.

Saman við manninum Martin, og gentunum Eyðrið sum fylti 9 ár mánadagin, 6 ára gomlu Dinu og 3 ára gomlu Annie, skapar hon ein tilveru á bygd við familju, arbeiði og frítíð:

Maðurin arbeiðir uttanlands í oljuvinnuni eftir fastari skipan. Børnini ganga øll á sama staði, tann elsta í skúla og hinar báðar í dagstovninum á Lítlu Mørk. Og Borghild sjálv sum er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur, hevur millum annað arbeitt á Eysturoyar røktar- og ellisheimi, men sum nú arbeiðir innan økispsykiatriska toymið við tænastu í Eysturoynni.

– Tað er sjálvandi eitt sindur einsligt onkuntíð, men ein lærir uppá ein máta at vera her í Oyndarfirði. Mær dámar henda serstaka friðin á bygd, og hevði heilt sikkurt saknað hann, um eg aftur skuldi flutt til ein bý at búgva, slær Borghild fast.

## Ikki flyta

Borghild var 25 ára gomul, tá hon fyrstu ferð búsettist her í bygdini, ið ikki beinleiðis liggur við alfaraveg. Hvørki hon ella maðurin hava nakað tilknýti til bygdina.

Hon og maðurin hava frammanundan gingið á landbúnaðarskúla í Noregi, og tá eitt festi varð leyst í Oyndarfirði í 2002 tóku tey av tí. Nakað seinni keyptu tey sær eisini eini gomul, men sera hugnalig hús beint við fjørðuna.

At byrja við vóru tey tvey í tali, men síðani komu genturnar. Tann fyrsta fyri júst níggju árum síðani.

– Hetta er okkara heim, og hetta fer altíð at verða ein partur av okkara lívi, sigur Borghild avgjørd. Og fyri børnini er eingin ivi um, at Oyndarfjørður er teirra heimbygd.

– Og sum er, hava vit ongar ætlanir um at fara nakran veg. Hetta er eitt satt paradis at búgva í, sigur Borghild.

## Til Grønlands

Tað eru longu liðin níggju ár, síðani Borghild flutti norður higar. Men tey hava kortini ikki búð her allatíðina.

Eftir at Borghild hevði lisið seg lidna sum sjúkrarøktarfrøðing og hevði arbeitt í eina tíð, kom hugurin at royna sína vitan á heilt øðrum staði.

Tí tóku tey avgerð um at flyta til Nuuk í Grønlandi í eitt ár, har Borghild hevur arbeitt á medisinsku deild á Drotning Ingrids Hospital í Nuuk og komu aftur beint undan jólum í fjør.

Hóast Borghild var burtur úr bygdini í fjør, hevur tað kortini ikki vikað við hugsanina at flyta aftur til heimstaðið í Oyndarfirði og tey søguligu húsini, nevnd "í Billustovu", sum vórðu bygd í 1899 og sum tey hava umvælt rættiliga nógv.

## Einki res

– Hetta er ein ótrúlig bygd, tí her er so friðarligt, so vakurt og eitt so fantastiskt stað hjá bæði børnum og vaksnum. Tá man er komin heim frá arbeiði, er tað næstan so, at man tímir ikki avstað aftur.

– Bygdin er merkt av friði, og tí er heldur einki res at merkja her.

Enn eru børnini so lítil, so at tað mest hevur verið tann elsta sum hevur havt tørv á at fara burtur í aðra bygd til ítrótt ella onnur tiltøk. Tann tíð fer helst at koma.

– Men her er tað bara so, at skalt tú nakrastaðni so mást tú koyra. Tað má man bara innstilla seg uppá.

– Tíbetur finnast nøkur tiltøk her, til dømis kunnu bæði børn og vaksin ganga til guitar og klaver undirvísing, og er áhugi, ber tað heilt víst til at skipa fyri øðrum tiltøkum eisini.

snorri@sosialurin.fo